gult10 cyan10 magenta10 svart10



FISKIVINNUTÍÐINDI

# Sjómmanstrúboðarin á Flemmish Cap

Føroyski sjómannstrúboðarin Torleif Johannesen er ein virkin maður og hann arbeiðir ikki bert við skipum, sum liggja við bryggjukant. Hann hevur fyrr verið umborð á skipum, sum royna í Barentshavinum og nú er hann og vitjar á feltinum á Flemmish Cap umborð á føroysku rækjuskipunum har á leiðini.

Fyrsta mánaðin skal Torleif Johannesen vitja umborð á skipunum og síðan ætlar hann at vera maður umborð í ein mánað, áðrenn hann kemur heim aftur.

Hann veit ikki enn hvørjum skipi, hann skal vera við, men tað verður neyvan nakar trupulleiki, tí nógv skip eru á Flemmish Cap og tey skifta vanliga manning, tá tey fara inn.

Torleif hevur sjónbond við sær til skipini. Eitt er av einum andaligum møti, sum varð hildið umborð á »Føstuvarða« og eitt er av ymiskum andaligum sangum.

# Íslendarar pressa seg fram allastaðni

**– Vit kunnu ikki halda á fram við at vera teir fittu dreingirnir. Íslendarar pressa seg fram allastaðni og vit sita eftir sum taparar. Tí hevur tað alstóran týdning, at standa fast við ikki at víkja fyri íslendarum á Flemmish Cap, sigur Bjarni Petersen, skipari á »Artic Viking«**



Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, boðaði frá herfyri, at føroyingar fóru ikki at minka veiðuna á Flemmish Cap við 16.7 prosentum, sum NAFO hevði mælt til, tí tvey baltisk lond høvdu boðað frá, at tey fóru ikki at skerja veiðuna, og Ísland vildi bert skerja veiðuna við 10 prosentum.

– Vit kunnu taka sum dømi kongafiskurin í Irmingarhavinum. Tað var føroyingurin Leif Nolsøe, sum fann kongafiskin av vesturlendsku londunum. Hann fekk nógvan fisk við »Skálafjalli«, men tá var ongin prísur. Russar høvdu veitt har í mong á frammanundan, men ikki vestlendingar og so slett ikki íslendingar. Vit veiða kanska við ov fáum skipum í fyrstuni og tá so verður býtt, so fáa vit alt ov lítið av kvotu samaborðið við hini. Og føroyingar mótmæla ikki, sigur Bjarni Pedersen.

– Nú kongafiskaprísurin er uppi í gjøgnum, nú standa vit eftir við ongum, nú eiga vit bert 4000 tons. Íslendingar hava 40.000 tons og grønlendarar eru har við einum skipi og teir hava stóra kvotu, umframt, at teir sleppa at fiska ein part av kvøtuni í íslendskum sjógvi, sigur Bjarni Pedersen, skipari.

# Føroyska sildakvotan hálvfiskað

Føroyska fiskiveiðieftirlitið sigur, at føroyingar hava veitt helvtina av kvotuni av norðhavssildini. Føroyingar hava higartil veitt 20.114 tons av norðhavssild og kvotan er 45.140 tons. Bara ein bátur er á sildaveiðu í løtuni. Tað er Norðborg, sum frystir umborð.

Roknað verður við, at farið verður aftur á sild í heyst. Útlitini fyri høgum prísi er góð. Sildin fer fyri umleið eina krónu til ídna og um fýra til seks krónur til matna.

# Føroyskir nótabátar veldugan fiskiskap undir Íslandi

Føroysku nótabátarnir hava sera góðan fiskiskap eftir svartkjafti í íslendskum sjógvi. Seinnapartin í gjár kom »Tróndur í Gøtu« á Fuglafjørð við 2600 tonsum av svartkjafti. Christian í Grótinum var hósdagin fulllastaður av svartkjafti.

Nakrar fáar dagar framman undan var hann eisini á Fuglafirði fullastaður af lodnu, sum hann hevði fingið í íslendskum sjógvi

Krúnborg var eisini á Fuglafirði mitt í vikuni. Hon hevði fulla last og hevði fingið veiðuna eftir fimm hálum. Í fyrsta hálinum hevði hon 500 tons.

Sunnudagin 1. juli sleppa føroyingar at veiða lodnu í Eysturgrønlandi. Skipanin millum Føroyar og Ísland er soleiðis, at føroyingar sleppa at veiða lodnukvotuna í Eysturgrønlandi í íslendskum sjógvi. Tað vil siga, at grønlendska kvotan gevur møguleika at veiða lodnu í íslendskum sjógvi.

# Onki grundarlag at lække fiskidagarnar

Tá Føroya Fiskimannafelag fer undir nakað, so er tað grundugt og nú hevur felagið sent landsstýrinum sítt egna tilmæli til fiskidagarnar. Hetta tilmæli telir góðar 40 síður. Og tað stutta av tí langa í tilmælinum er, at ongin orsøk er til at lække fiskidagatalið í ár.

– Fiskidagaskipanin var upprunaliga gjørt sum skipan, har fiskidagarnir skuldu regulerast eftir eini ásettari skipan. Grundarlagið var, at skipanin var upprunaliga rætt stillað. Men fyritreytin fyri skipanina er, at samlaða veiðuorkan er støðug. Tí skuldi dagatalið bara regulerast í tann mun veiðuorkan broyttist. Men hetta arbeiði, at gera veiðuorkuna upp, er ongantíð gjørt. Tí eru fortreytirnar fyri at fiskidagarnar als ikki til staðar, sigur Óli Jacobsen.

# Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

32 bátar seldu góð 47 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum fríggjadagin

| Syslu-nummar | Skipanavn | reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 102 | Bylgjan | lína | 426 |
| FD 361 | Súlan | lína | 1.248 |
| FD1065 | Áargarður | lína | 272 |
| KG 123 | Háenni | lína | 3.944 |
| KG 125 | Bjarnaberg | lína | 480 |
| KG 127 | Skurðaklettur | lína | 2.382 |
| KG 171 | Núpisklettur | lína | 900 |
| KG 23 | Nancy | lína | 716 |
| KG 241 | Fremad | lína | 1.427 |
| KG 276 | Skorhamar | lína | 923 |
| KG 284 | Hellisendi | lína | 2.311 |
| KG 288 | Heltnin | lína | 842 |
| KG 293 | Fagraenni | lína | 1.989 |
| KG 334 | Norðan | lína | 1.956 |
| KG 391 | Eysturhøvdi | lína | 347 |
| KG 407 | Jøkul | lína | 1.304 |
| KG 47 | Havsbrún | lína | 2.508 |
| KG 512 | Neshamar | lína | 750 |
| KG 543 | Halgafelli | lína | 1.417 |
| KG 561 | Fagriklettur | lína | 1.377 |
| KG 587 | Reynsmúli | lína | 3.048 |
| KG 642 | Bragd | lína | 4.327 |
| KG 681 | Nestindur | lína | 2.431 |
| KG 703 | Henny | lína | 533 |
| KG 705 | Sonja | lína | 310 |
| KG 706 | Skýlisklettur | lína | 728 |
| KG 744 | Osla | lína | 3.161 |
| KG 79 | Nevið Reyða | lína | 1.901 |
| KG 832 | Borgin | lína | 709 |
| KG 92 | Øldan | lína | 389 |
| KG 94 | Brid Ford | lína | 458 |
| TN 723 | Brattaskorð | lína | 1.678 |

| Vørunavn | kilo | | |
|---|---|---|---|
| Brosma 2 | 47 | Longa 3 | 66 |
| Brosma 3&4 | 134 | Longa 4&5 | 15 |
| Hýsa 1 | 10.301 | Reyðsprøka 0 | 14 |
| Hýsa 2 | 8.749 | Skøta | 15 |
| Hýsa 3 | 6.308 | Skrubba | 9 |
| Hýsa 4 | 4.915 | Steinbítur | 18 |
| Havtaska 0 | 138 | Toskur 1 | 139 |
| Hvítingur 0 | 3.262 | Toskur 2 | 2.339 |
| Kalvi 3 | 10 | Toskur 3 | 5.354 |
| Kalvi 4 | 5 | Toskur 4 | 3.297 |
| Longa 1 | 226 | Toskur 5 | 1.657 |
| Longa 2 | 151 | Upsi 3 | 20 |
| | | Upsi 4 | 3 |

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# At stremba eftir stjørnunum

**- Røða hildin fyri studentum og HF'arum inni á Kambsdali**



*Kári á Rógvi, skrivari í grundlógarnevndini, var gestarøðari á pisufundinum á Kambsdali seinasta hósdag*

Fyrr í ár var eg á veg yvir til Íslands við umboðum fyri grundlógarnevndina. Umborð á flúgvaranum las eg eina blaðgrein um ein føroyskan tónleikara.

Yvirskriftin var: "eg eri ongin stjørnustrembari". Hóast drongurin mær vitandi var bestur á sínum instrumenti í Føroyum, og greinin annars var um avrik hansara, so var tað honum umráðandi at sissa lesaran. Tað var mestum av óvart, at hann hevði fingið andlig evni. Og tó at hann hevði hug og dugna, so var tað sjálvandi ikki so, at hann ætlaði at gera nakað stórvegis við tað — hann var ikki nakar stjørnustrembari.

Eg standi her í dag og kann ikki annað enn bekenna, at eg eri ein stjørnustrembari.

Í mínum uppvøkstri var tað so, at megnaði onkur at draga toskar ella kasta bóltar í mál, so var tað øgiligt — tey fingu medalju um hálsin, og erptu sær ikki sørt.

Sjálvur avrikaði eg ikki nógv handaliga, hevði nóg illa handalag at flysa epli, men tað bókliga lá betri fyri. Eg fór einaferð fegin at fortelja ommu míni, at eg hevði fingið 13 í stíli. Men heldur enn at rósa mær, so sendi eyguni eftir mær, og brigslaði, at aðrir reypaðu ikki um sínar karakterir.

Her á landi fær ein rættiliga fittur partur av hvørjum árgangi húgvuna á høvdið. Men hóast tað, er tað ikki loyvt at reypa um karakterir. Ongin fær heiðursmerki fyri bóklig avrik, tað er ongin ársins studentur ella stíla grand prix, onki steyp til ognar fyri besta avrik í søgu.

At fáa 13 er sum at vinna kappróður á ólavsøku ella at taka seyð í skorini ella draga eina flundru, tað er bagd – tað er avrik.

Hesi brøgd er í sær sjálvum onki. Tú kanst ikki eta eitt 13-tal ella selja eitt FM-heiti ella liva av taka verðragjólingar uttanrætta. Men at seta sær setning fyri og síðani syfta allur súður frá hond til málið er nátt, tað er bragd, tað er avrik.

Tað einasta sum eftir stendur er innsatsurin, venjingin, átakið, strembanin. Tann, sum klárar at vinna eitt FM-heiti ella klárar eina miðnámsútbúgving, er eitt sindur betri fyri í lívinum. Evnini at kýta seg, at díkja á, tey koma væl við, tá tit skulu uppala børn ella smíða hús, stýra landinum ella spæla sjónleik.

Ambitión. Áræði. Bragdarhugur. Hesi orð er vanliga bannaði í Føroyum, tá ræður um andalig ella bóklig viðurskifti. Sjálvt tey dugnaligstu bókligu fólkini kenna trongd til at fortelja, at tey hava verið til skips ella hava skift blæðu. Tað bókliga avrikið var ikki við vilja, og ætlanin var slett ikki at reypa um tað.

Alt gott um sjómenn og húsmøður, men tey eru ikki einsamøll um at avrika nakað. Og ongin er bara sjómaður ella bara húsmóðir. Øll eru vit samansett av ymsum hugum og hellingum. Vit hava yrki, familju, feløg, hagapartar og grannaløg, sum knýta okkum at øðrum menniskjum, og sum gera okkum til einstaklingar í felagi, originalar síður í eini drúgvari, samanhangandi bók.

Øll eiga eina stjørnu at stremba eftir, øll kunnu gera seg galdandi á sínum øki.

Men, ongin ger seg galdandi einsamallur. Heimasandsmaðurin skeyt upp bygdin gjørdi okkutt stórt – eitt rørportur. Ein miðnámshúgva er nakað stórt og er úrslitið av blóði, sveitta og tárum hjá eini heilari familju.

Í kvæðnum um Ormar Tórálvsson stendur: "signað verði móðirin, bitan í munnin legði." Uttan mammur og ommur, pápar, systkin og vinfólk, bar illa til hjá nøkrum kappa at avrika nakað.

Brúsajøkil og hinir risarnir í kvæðunum eru myndir um tær avbjóðingar, ið forða okkara vegi fram í lívi, um ikki kropsliga, so andaliga, mentalt.

So siglir hann Ormar
norð for Herjalond,
bæði so kom honum Gud
í hug, og tann heilaga ond.

Hvør húgva her í dag er úrslitið av einum samstarvið millum forløg og foreldur, gávur og ágrýtni.

Eg hugsi ofta um ommusystrarnar hjá mær, tá eg hoyri fólk bera seg undan stjørnustremban. Ein teirra var jarðarmóir og vinnulívskvinna, áðrenn javnstøðulógir og vinnuframgrunnar vóru uppfunnin.

Hon átti millum annað nógvar Mikines-málningar, sum hon keypti frá Mikinesi sjálvum, tá hann var ungur og ókendur. Men, tá fekk hann eisini gagn av tí.

Tá mín kæri vinur, tokulúðurin við Langanes, herfyri keypti ein Mikines-málning, so kom tað ikki Mikinesi sjálvum til góða. Og tað er heldur ikki heilt rætt, at tosa um ein føroyskan málning. Málningurin er ein Mikines-málningur við fyrra i, eitt úrslit av persónligum áræði og stjørnustremban, og so hjálp frá nærumhvørvi og góðum fólki.

Vælsignan eigi tykkum, verið góð við stjørnustrembararnar, meðan teir enn stremba.

At stremba er gott. Men at stremba er ikki bara at royna at eftir karakterum. At stremba er at royna eftir nýggjum fiskasløgum. At stremba er geva einum barni ein tryggan uppvøkstur.

Hvør hevur sínar stjørnur at stremba eftir.

Tað ringasta er kanska, tá fólk stremba eftir teimum skeivu stjørnunum. Vit minnast øll drongin, sum las sosialpsykologi í tvey ár, men gavst, tí tað segði honum onki.

Tonglatummas yrkir um Teodor hjá Trolpóli, sum meira av plikt enn av hugi tók studentaprógv, tó at í tølum, hann fekk ei so nógv. Fyrst røður Trolpól 'hoyr Teodor mín best, tú lesur til prest.' Tá tað ikki gekk, kom fjarrit, úr Aberdeen, 'tú les medisin.' At enda sendi pápin syrgin boð úr Fletwood, 'ei alt enn er mist, tú les til jurist, tú les til jurist.'

Men, sjálvt um jura er útbúgvingin fyri bedre folks dumme børn, so var jústianus so turrur sum mjøl, og mátti tí sum alt annað skolast niður við øl — og úrslit hareftir.

Tað er lívshættilsigt at hava slík foreldur, sum hava áræði og bragdarhug vegna sína børn. Tað er gott at eggja til og stuðla, men har hugur, evni og umstøður ikki fylgjast at, er lítið gott í væntu.

Veljið tykkara stjørnu væl, um tað er at gera eitt rørportur ella at taka eina útbúgving, meddið eftir henni, og royni so alt tit orka. Tað býttasta er at taka útbúgvingar fyri annað enn ítrott, og ítrott fyri annað enn útbúgving. Takið heldur fleiri útbúgvingar enn at dvølja við einari, takið heldur við einum lágum karakteri enn at útseta próvtøkur, lívið er ov stutt til at rógva ólavsøkuróðurin umaftur.

Omma mín (hon var ikki so galin kortini) lærdi meg reglurnar hjá Ibsen:

*Hvad du gør, det gør helt,*
*ikke stykkevist og delt.*

So, gerið okkut stórt, strembið og stuðlið hvør øðrum, strembið eftir stjørnunum.

Hjartaliga tillukku, studentar, HF'arar, foreldur, abbar og ommur við hesi stjørnuni.



